## Milliard-sáttmáli til Barcelona

Hóast Barcelona misti møguleikan fyri stórum upphæddum, tá teir herfyri máttu lúta fyri Liverpool í Champions League, so er pengakassin ikki heilt tómur kortini. Í øllum førum hevur felagið júst gjørt sáttmála við Nike, sum eisini verður klædnasponsor næstu fimm kappingarárini. Kostnaðurin fyri sáttmálan er ikki minni enn 1,1 mia kr.

## Romario skeyt Hattrick

41 ára gamla brasilska fótbóltslegendan, Romario, hevur nú bert fimm mál eftir upp til tey 1.000 málini, ið hann hevur sett sær sum mál. Sunnudagin vann hann saman við Vasco da Gama 4-11 á Madureira, og ikki færri enn tríggjar ferðir var Romario á blettinum. Samlaða máltal hansara er nú 995, og sjálvur hevur áleyparin sagt, at hann gevst, tá mál nummar 1.000 er skotið.



# Messi bjargaði Barca



*Lionel Messi varð heilt stóra hetjan á Camp Nou, tá hann við einum hattrick tríggjar ferðir javnaði Real Madrid-leiðslu*
*Mynd: Scanpix*

**El Clasico verður dysturin nevndur. Og kanska størsti fótbóltsdysturin av øllum livdi so sanniliga upp til navnið, tá Real Madrid leygarkvøldið var á vitjan á Camp Nou hjá Barcelona**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seks mál. Eitt reytt kort og hat-trick av argentinska Messi var kryddið í einum dysti, har intensitetur, stoltleiki og vinnaravilji lýstu úr hvørjum einasta spælara.

Ófatuligi stuðulin, sum heimaáskoðararnir vanliga geva sínum liðum í uppgerðini, hevur gjørt útisigrar til eitt sera sjáldsamt fyribrigdi í El Clasico, men tað var tó um reppið, at Real Madrid fekk ein sjáldsaman av slagnum leygarkvøldið. Ein møguleiki, sum Lionel Messi tó steðgaði.

Tríggjar ferðir var Real Madrid á odda. Fyrstu ferð eftir bara fýra minuttum, tá Ruud van Nistelrooy fekk ovmikið av plássi, so hann kundi skora av brotsteigarmarkinum.

Fyrst royndi Eto'o seg av brotsteigarmarkinum, og tá Messi løtu seinni royndi seg úr sama stað, sang bólturin í meskunum.

Tann støðan helt tó ikki leingi. Minuttin eftir feldi Oleguer Guti í kriminella økinum, og so kundi Nistelrooy skora sítt seinna mál í dystinum.

Verjuspælið var ikki hásætinum, og møguleikarnir skolaðu báðar vegir. Og enn einaferð kundi Messi javna. Hesa ferð tá hann var fyrstur á returbólti frá eini Ronaldinho-roynd.

### Útvísing gav Madrid møguleikan

Opna spælið helt fram. serliga var Barcelona heilt nær við. Men tá teir beint fyri steðgin msti Oleguer, sum fekk sítt sienna gula kort, lá seinni hálvleikur beint til gestirnar.

Barcelona royndi framvegis at skapa nakað, men Madrid var tó eisini nær við. Og 18 minuttir fyri tíð gav hetta úrslit, tá Sergio Ramos stútaði frísparksinnlegg.

Við 10 monnum legði Barcelona tó stórt tryst á seinastu løtuna. Real Madrid helt tó skansan í 90 minuttir, men í 91. minutti skrivaði Messi seg í ævigu søgubøkurnar hjá Catalanum, tá hann við vinstra beini meðdaði bóltin fram við Casillas, so skommin varð fyribyrgd.

Javnleikurin ber við sær, at Barcelona framvegis er oddalið saman við Sevilla. Tey hava 50 stig. Real Madrid er á fjórða plássinum við 45 stigum.

## Toppskjúttar í hondbólti

**Atlantic Airways kappingin:**

| | | |
|---|---|---|
| Damir Oros | KÍF | 151 |
| Finnur Hansson | StÍF | 145 |
| Blagoje Buha | Neistin | 121 |
| Sámal Joensen | VÍF | 121 |
| Rókur Akralíð | Kyndil | 120 |
| Esbern Patursson | H71 | 118 |
| Daniel Rapa | KÍF | 109 |
| Agnar Joensen | VÍF | 99 |
| Tróndur Kragesten | Neistin | 92 |
| Hans Áki Dal Christiansen | Kyndil | 91 |

**Sunset kappingin:**

| | | |
|---|---|---|
| Nicoleta Radu Hansen | Neistin | 149 |
| Daiva Tuomaite | VB | 124 |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 97 |
| Ninna K. Johansen | StÍF | 95 |
| Lina Andriulyte | Kyndil | 92 |
| Simona Petersen | Stjørnan | 84 |
| Alina Olaru | Stjørnan | 74 |
| Ása Dam á Neystabø | Neistin | 59 |
| Ivana Ljubicic | VB | 56 |
| Anja Heinadóttir | Kyndil | 53 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
MENN

**Atlantic Airways-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 9 | 4 | - | 1 | - | 4 | 589 | 532 | 57 | 18 |
| 2 Kyndil | 9 | 6 | - | 2 | - | 1 | 561 | 523 | 38 | 18 |
| 3 StÍF | 9 | 4 | - | 0 | - | 5 | 512 | 512 | 0 | 15 |
| 4 KÍF | 9 | 4 | - | 4 | - | 1 | 512 | 528 | -16 | 15 |
| 5 Neistin | 9 | 3 | - | 1 | - | 5 | 574 | 556 | 18 | 13 |
| 6 H71 | 9 | 1 | - | 2 | - | 6 | 510 | 607 | -97 | 7 |

**Flogbóltsstøður**
**Meistaradeild kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 19 | 14 | - | 5 | 48 | 32 | 16 | 21 |
| 2 SÍ | 19 | 13 | - | 6 | 45 | 28 | 17 | 20 |
| 3 Dráttur | 19 | 12 | - | 7 | 45 | 34 | 11 | 17 |
| 4 KÍF | 19 | 7 | - | 12 | 35 | 41 | -6 | 12 |
| 5 TB | 19 | 8 | - | 11 | 33 | 35 | -2 | 10 |
| 6 Mjølnir | 19 | 3 | - | 16 | 16 | 52 | -36 | 2 |

**Meistaradeild menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 15 | 13 | - | 2 | 41 | 16 | 25 | 19 |
| 2 Mjølnir | 14 | 10 | - | 4 | 33 | 21 | 12 | 14 |
| 3 Fram | 15 | 8 | - | 7 | 30 | 30 | 0 | 12 |
| 4 Fleyr | 16 | 4 | - | 12 | 21 | 40 | -19 | 6 |
| 5 SÍ | 14 | 2 | - | 12 | 21 | 39 | -18 | 3 |

**Danska superligan**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 FCK | 19 | 13 | - | 5 | - | 1 | 35 | 12 | 23 | 44 |
| 2 FCM | 19 | 11 | - | 5 | - | 3 | 38 | 22 | 16 | 38 |
| 3 OB | 19 | 10 | - | 5 | - | 4 | 25 | 17 | 8 | 35 |
| 4 **AaB** | 19 | 9 | - | 4 | - | 6 | 23 | 19 | 4 | 31 |
| 5 FC Nordsj. | 19 | 9 | - | 3 | - | 7 | 35 | 22 | 13 | 30 |
| 6 Brøndby | 19 | 7 | - | 6 | - | 6 | 26 | 21 | 5 | 27 |
| 7 Esbjerg | 19 | 7 | - | 6 | - | 6 | 31 | 29 | 2 | 27 |
| 8 Randers | 19 | 7 | - | 4 | - | 8 | 26 | 27 | -1 | 25 |
| 9 Viborg | 19 | 6 | - | 3 | - | 10 | 20 | 35 | -15 | 21 |
| 10 AC Horsens | 19 | 4 | - | 7 | - | 8 | 14 | 24 | -10 | 19 |
| 11 Vejle | 19 | 2 | - | 4 | - | 13 | 21 | 44 | -23 | 10 |
| 12 Silkeborg | 19 | 2 | - | 2 | - | 15 | 16 | 38 | -22 | 8 |

Føroyskir spælarar: Súni Olsen og Jón Rói Jacobsen (AaB)

**Enska Premier League**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Man Utd. | 29 | 23 | - | 3 | - | 3 | 66 | 19 | 47 | 72 |
| 2 Chelsea | 28 | 19 | - | 6 | - | 3 | 50 | 19 | 31 | 63 |
| 3 Liverpool | 29 | 16 | - | 5 | - | 8 | 44 | 20 | 24 | 53 |
| 4 Arsenal | 27 | 15 | - | 7 | - | 5 | 50 | 23 | 27 | 52 |
| 5 Bolton | 29 | 14 | - | 5 | - | 10 | 34 | 34 | 0 | 47 |
| 6 Everton | 29 | 11 | - | 10 | - | 8 | 37 | 26 | 11 | 43 |
| 7 Reading | 29 | 13 | - | 4 | - | 12 | 42 | 38 | 4 | 43 |
| 8 Tottenham | 29 | 12 | - | 6 | - | 11 | 40 | 43 | -3 | 42 |
| 9 Portsmouth | 29 | 11 | - | 8 | - | 10 | 36 | 31 | 5 | 41 |
| 10 Blackburn | 29 | 12 | - | 4 | - | 13 | 35 | 39 | -4 | 40 |
| 11 Newcastle | 29 | 10 | - | 7 | - | 12 | 34 | 37 | -3 | 37 |
| 12 Middlesbr. | 29 | 9 | - | 9 | - | 11 | 32 | 34 | -2 | 36 |
| 13 Aston Villa | 28 | 7 | - | 12 | - | 9 | 29 | 34 | -5 | 33 |
| 14 Fulham | 29 | 7 | - | 12 | - | 10 | 31 | 44 | -13 | 33 |
| 15 Wigan | 29 | 9 | - | 5 | - | 15 | 30 | 44 | -14 | 32 |
| 16 Sheffield Utd. | 29 | 8 | - | 7 | - | 14 | 25 | 41 | -16 | 31 |
| 17 Man City | 27 | 8 | - | 6 | - | 13 | 20 | 33 | -13 | 30 |
| 18 Charlton | 29 | 6 | - | 6 | - | 17 | 26 | 49 | -23 | 24 |
| 19 Watford | 29 | 3 | - | 11 | - | 15 | 18 | 43 | -25 | 20 |
| 20 West Ham | 29 | 5 | - | 5 | - | 19 | 18 | 46 | -28 | 20 |

**Enska League One**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Scunthorpe | 37 | 21 | - | 11 | - | 5 | 58 | 27 | 31 | 74 |
| 2 Bristol City | 36 | 20 | - | 8 | - | 8 | 50 | 31 | 19 | 68 |
| 3 Yeovil | 37 | 18 | - | 10 | - | 9 | 48 | 33 | 15 | 64 |
| 4 Nottm Forest | 37 | 18 | - | 10 | - | 9 | 49 | 35 | 14 | 64 |
| 5 Oldham | 37 | 18 | - | 8 | - | 11 | 58 | 36 | 22 | 62 |
| 6 **Blackpool** | 36 | 15 | - | 11 | - | 10 | 50 | 38 | 12 | 56 |
| 7 Tranmere | 37 | 15 | - | 11 | - | 11 | 45 | 37 | 8 | 56 |
| 8 Swansea | 37 | 15 | - | 10 | - | 12 | 53 | 40 | 13 | 55 |
| 9 Doncaster | 37 | 14 | - | 12 | - | 11 | 42 | 37 | 5 | 54 |
| 10 Carlisle | 37 | 14 | - | 10 | - | 13 | 38 | 45 | -7 | 52 |
| 11 Millwall | 36 | 15 | - | 6 | - | 15 | 45 | 48 | -3 | 51 |
| 12 Port Vale | 37 | 15 | - | 5 | - | 17 | 48 | 47 | 1 | 50 |
| 13 Crewe | 36 | 14 | - | 6 | - | 16 | 55 | 59 | -4 | 48 |
| 14 Hudddersfield | 37 | 12 | - | 12 | - | 13 | 48 | 57 | -9 | 48 |
| 15 Brighton | 37 | 13 | - | 8 | - | 16 | 42 | 47 | -5 | 47 |
| 16 Gillingham | 37 | 13 | - | 7 | - | 17 | 46 | 62 | -16 | 46 |
| 17 Northampton | 37 | 11 | - | 12 | - | 14 | 36 | 38 | -2 | 45 |
| 18 Leyton Orient | 37 | 11 | - | 12 | - | 14 | 50 | 60 | -10 | 45 |
| 19 Bournemouth | 37 | 10 | - | 10 | - | 17 | 39 | 52 | -13 | 40 |
| 20 Chesterfield | 37 | 10 | - | 9 | - | 18 | 39 | 45 | -6 | 39 |
| 21 Bradford | 36 | 9 | - | 11 | - | 16 | 37 | 47 | -10 | 38 |
| 22 Cheltenham | 37 | 10 | - | 7 | - | 20 | 35 | 52 | -17 | 37 |
| 23 Brentford | 37 | 7 | - | 12 | - | 18 | 29 | 56 | -27 | 33 |
| 24 Rotherham * | 36 | 10 | - | 8 | - | 18 | 49 | 60 | -11 | 28 |

Føroyskir spælarar Claus Bech Jørgensen (Blackpool)

*) Rotherham byrjaði árið við 10 minusstigum. Hetta tí felagið er sett undir umsiting